**Føroya Tele P/f**

Att.: Andras Róin, stjóri/
Hákun Steingrímsson, nevndarformaður

Hoyvík 11.04.2006

**Bakstøði fyri hesi gjøgnumgongd:**
Føroya Tele hevur tikið avgerð um, at keypa partabrøv í partafelagnum, sum eigur tíðindablaðið Socialin.
Støðan er hon, at Javnaðarflokkurin, sum átti allan partapeningin í blaðnum, hevur tikið avgerð um at selja partabrøvini til nakrar av medarbeiðarunum á Socialinum og hesir hava so bjóða Føroya Tele, at keypa ein minnilutapart av partabrøvunum frá teimum.
Føroya Tele hevur gjøgnum longri tíð havt samstarv við Socialin, sum veitir ymsar tænastur til felagið, herundir tíðindatænastu til portalin hjá Føroya Tele.

Samráðingarnar um sáttmála um keyp av partabrøvum eru ikki lidnar og endaligur sáttmáli ikki undirskrivaður.
Leiðslan í Føroya Tele, nevnd og stjórn, hava mett um støðuna og halda *deils* at keypið er fíggjarliga skilagott og *deils* at tað ikki eru nakrar løgfrøðiligar forðingar fyri keypinum.

Eftir at tíðindini bórust um, at Socialurin var seldur og at Føroya Tele var ein av keyparunum, er fyrispurningur settur í Føroya Løgtingi av Heidi Petersen løgtingskvinnu, til Bjarna Djurholm, landsstýrismann har m.a. verður spurt um landsstýrismaðurin í vinnumálum heldur at:

> *keypið av Socialinum liggja innan virkisøkið hjá almenna partafelagnum Føroya Tele.*

Umframt at hava sett fyrispurningin á Føroya Løgtingi, hevur Heidi Petersen, løgtingskvinna heitt á
Landsstýrismálanevndin, sum vegna Løgtingið hevur eftirlit við, at landsstýrið heldur seg innan lógarinnar karmar við áheitan um at seta í verk kanning av málinum um at Føroya Tele hevur keypt partapening í Sosialinum.

Leiðslan í Føroya Tele hevur tí avgjørt at spyrja um eina løgfrøðiliga meting av viðurskiftunum og hevur vent sær til undirritaða við áheitan um eina løgfrøðiliga gjøgnumgongd av um keypið, er innanfyri karmarnar, sum eru settir um felagið.

***Grundarlag fyri tulkingini***
Grundarlagi undir at svara fyrispurninginum verður tikið í:

1. løgtingslóg nr. 42 frá 3. apríl 1998 um umlegging av Telefonverki Føroya Løgtings til partafelag(hereftir nevnd Umleggingarlógin),
2. løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1977 um fjarskifti (hereftir nevnd Fjarskiftislógin)
3. Viðtøkur fyri P/f Telefonverkið
4. Onnur tulkingaríkøst.

*Umleggingarlógin:*
Tær greinar í *umleggingarlógini*, sum hava týdning fyri tulkingina eru serliga hesar:
Í § 1 er ásett at:

> *at endamál lógarinnar er at umskipa almenna stovnin Telefonverk Føroya Løgtings til eitt partafelag.*

Í hesum liggur, at ein ætlan við umskipanini var, at Telefonverkið frameftir skuldi vera rikið sum vinnurekandi felag, jbr. § 1, stk. 1 í partafelagslógini, ið ásetur at:

> *denne lov finder anvendelse på alle erhvervsdrivende aktieselskaber".*

Í § 3, stk. 1 er ásett at:

> *felagið verður stovnað við tí endamáli at hava í hondum og reka fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu, umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi.*

Í viðmerkingunum til § 3, stk. 1, verður m. a. sagt, at:

> *um so er, at partafelagið ynskir at fara í aðra vinnu enn fjarskiftisvinnu, krevst lógarbroyting".*

Eisini verður í forarbeiðnum m.a. víst á, (fylgiskjal "Frágreiðing um umskipan av TFL til partafelag") at:

> *fjarskifti ikki kennir til landamørk, hvørki fíggjarliga ella tøkniliga, og at internationaliseringin merkir, at bæði marknaðurin í Føroyum og virksemið hjá TFL virka í einum altjóða høpi.*
>
> *Omanfyri nevndu viðurskifti hava við sær, at tað er alneyðugt at fylgja við menningini á fjarskiftisøkinum.*
> *TFL má tí støðugt tillaga seg broytingum í marknaðarviðurskiftunum*
>
> *Til tess at kunna veita viðskiftafólkunum tær tænastur, sum hoyra til í einum nýmótans samfelagi, at kunna tryggja eitt nøktandi fjarskiftiskervi um allar Føroyar og at kunna leggja lunnar undir eitt neyvari samstarv við aðrar fyritøkur á fjarskiftisøkinum, er alneyðugt at fylgja rákinum í øðrum londum og at virka fyr, at eisini TFL, verður umskipað til partafelag skjótast gjørligt.*

*Fjarskiftislógin:*
Tær greinar í *fjarskiftislógini*, sum hava týdning fyri tulkingina eru serliga hesar:
Í § 3 stk. 1 er ásett at:

*Felagið verður stovnað við tí endamáli at hava í hondum og reka*

- *fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu umframt*
- *aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.*

Í § 2 er *fjarskiftiskervi* allýst soleiðis:

*kervi til flutning og sundurskifti av signalum millum skilgreinaðar kervisendar gjøgnum kaðal, radio, ljós ella á aðrari elektromagnetiskari rás.*

Í § 2 er *fjarskiftistænasta* alllýst soleiðis:

*Tænasta innan fjarskifti, sum heilt ella partvíst er við flutningi í fjarskiftiskervi.*

Í § 2 er *fjarskifti* er allýst soleiðis:

*flyting, sending ella móttøka av tekni, signali, skrift, mynd, ljóði ella onnur boð av hvørjum slagi, við hjálp av ljósi, radiosignali ella øðrum elektromagnetiskum signali í einum samskiftiskervi.*

Í forarbeiðnum til fjarskiftislógina verður víst til, at

*eitt av teimum økjum, har kravið um broytingar hevur verið harðast, er fjarskiftisøkið. Lóggáva er sett í verk sum ska1 seta út í kortið bygnaðin fyri framtíðarmenningina á teleøkinum, sum ska1 tryggja støðið undir tí sum rópt verður "informatiónssamfelagið "... Nú verður fjarskifti í størri mun mett sum ein partur av og ein fortreyt fyri búskaparligari og samfelagsligari menning, bæði í framkomnu londunum og triðja heiminum.*

*Teldutøkni og samskiftistøkni fylgjast, ofta kann vera ringt at ski1ja ímillum. Á marknaðarsíðuni er eisini ein menning í gongd, sum ger at teldu-, samskifti- og undirhaldsmarknaðamir falla saman og geva nøring til fyribrigdi sum m.a. multimedia og internet.*

*Aftanfyri menningina liggur eisini tann hugburður, at telesamskifti og kunningartøkni hava ment seg til at vera lyklafaktorar fyri samfelagsligu og búskaparligu menningina yvirhøvur. Teletænastur eru eitt virðismikið búskaparligt tilfeingi og fjarskifti verður mett sum ein partur av og ein fortreyt fyri búskaparligari og sosialari menning, bæði í framkomnum londum og triðja heiminum".*

*Viðtøkur felagsins:*
Endamálsordingin í § 3, stk. 1 í vidtøkum felagsins er sjálvandi orðað samsvarandi 1ógini.
Í § 3, stk. 2 í vidtøkunum er m.a. ásett, at:

*"felagið skal sum heild vera rikið efir meginreglunum fyri vinnuligar fyritøkur".*

***Tulkingin***
*Fjarskiftiskervi ella fjarskiftistænastu*

Støðið verður tikið í lógartekstinum og tá ber illa til málsliga at siga at útvegan av partabrøvum í einum tíðindablaðið kann koma undir fjarskiftiskervi ella fjarskiftistænastu.
Tó er tað soleiðis, sum forarbeiðini lýsa viðurskiftini, at tað ongantíð hevur verið ætlanin at binda felagið niður við einari tulking av hesum hugtøkum til tað innihald hesi høvdu tá lógin var til. Av forarbeiðnum sæst júst, at talan er um, at fjarskifti má lýsast nøkunlunda sum tað verður í grannalondum okkara, sum vit kappast við og ikki leyst av hvat onnur lond halda.
Tað er tí ein ”dynamisk” tulking, sum má fara fram har hugt verður eftir altjóða rákinum, tí fjarskifti er av slíkum slagi at tað broytist næstan dag um dag, hvat innihaldi av hugtakinum viðvíkur.
Forarbeiðini vísa á hesi viðurskifti so ein slíkur tulkingarháttur er eftir mínum tykki tað rætta tulkingarlagi tá tað ræður um fjarskifti.
Síðani fjarskiftislógin var sett í gildi í 1997 er hugtakið ”fjarskifti” broytt munandi á altjóða pallinum, sum vit til dagligt bera okkum saman við og krevja, at felagið skal vera kappingarført við.
EU hevur tikið fylgjurnar av hesum og setti 25. juli 2003 fleiri nýggj direktiv í gildi, m.a. nýtt rammudirektiv (L 108/33).
Nýggju direktivini eru tøknineutral. Tað merkir m.a., at fjarskiftisveitarar og kringvarpsveitarar nú verða reguleraðir eftir somu reglum, sum nú hava fingið felags heiti: "Electronic Communications networks"
Ein samanrenning millum tele, KT og media innan alt EU. Øll transmission og alt samskifti innan EU skal nú viðfarast eftir júst somu reglum, líkamikið um talan er um tele, radio, tv, fylgisvein ella aðrar miðlar, og líkamikið hvat slag av tøknifrøði, KT- platformum ella undirstøðukervi verður nýtt. Nýggja tøknin, ið er sprottin fram, verður í altjóða høpi undir einum ofta kallað ICT (Information & Communication Technology).

Reint málsliga má tí innihaldi í hugtakinum sigast at vera broytt munandi og sum sæst omanfyri eru aðrir miðlar tiknir við enn traditionella kjarnuumráði hjá telefyritøkum, sum var telefoni.

Undir øllum umstøðum haldi eg, at tað er forsvarligt at siga, at tað at eiga lut í einum tíðindablaðið, sum m.a. servicerar ein tíðandi part av eins kjarnufyritakssemi(tíðindatænasta, portalur, flaks v.m)., ikki er heilt av leið at koma undir tað víðkaða hugtakið hvat fjarskifti er í dag.
Viðgangast skal tó, at uttan aðrar keldur enn tað primera, sum er lógarteksturin, so er hetta ivasamt um sigast kann at keypið av partabrøvum í einum miðlahúsi, fellir innanfyri ”fjarskifti”.

*Aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.*
Júst slíkar keldur eru til taks, sum stuðla einum í, at slíkt keyå her er talan um, kann sigast av vera innan lógarásettu karmarnar.
*Deils* er talan um lógarásetingina um ” *aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið”* og *deils* eru subjektivar keldur til taks, sum stuðla undir tulkingini. Her er tað serliga forarbeiði til løgtingslógirnar, sum saman við víðkaða lógartekstinum, stuðla tulkingini, at hetta er innanfyri lógarásettu karmarnar.
Ætlanin við orðingini av endamálsgreinini var ikki at binda menningina av P/f Telefonverkinum innanfyri trongar, óbroytiligar karmar.
Hetta sæst av lógartekstinum, sum vísir, at endamál felagsins er víðkað til at felagið kann reka
” *aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið”.*

Av hesum skilst, at ætlanin ikki hevur verið at avmarka virkismøguleikarnar, tá tað ræður um fjarskiftisvinnu og aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi, sbr. §3, stk. 1 í lógini.

Her verður víðkað um hvat gerast kann og tá havt verður í huga, at eisini forarbeiðini til løgtingslógirnar stuðla tulkingarlagnum, so verður hildið, at Føroya Tele, ikki er farið út um karmarnar fyri hvat lógin hevur ásett, men kanska er komið út ímóti karmunum, soleiðis sum teir síggja út í dag.

Tað er eftir mínum tykki eftir hesum parti av lógargrundarlagnum, at tað kann forsvarast, at felagið hevur keypt seg inn í eina fyritøku, sum er eitt miðlahús, sum m.a. veitir tænastur beinleiðis til ein part av kjarnutænastunum hjá Føroya Tele, sum interneti er, herundir portalur v.m.

Forarbeiðini, sum eru lýst omanfyri vísa júst, at longu tá fjarskiftislógin og umleggingarlógin vóru samtyktar, var tankin at geva rúmd fyri, at Telefonverkið kundi menna seg, í kapping á altjóða pallinum og víst var á, at hetta kom at hava broytingar í virkisøkinum frá tí traditionella kjarnuøkinum og til onnur virkisøki, sum høvdu samband við hetta.

*Niðurstøða:*
Niðurstøðan er tí, at Føroya Tele ikki er farið útum karmarnar fyri sítt lógarásetta virksemi við sínum keypi av partabrøvum í Socialinum.

Vinarliga

Magnus S. Petersen